
Dansibólkurin Peter Friis Team framførdi dansistykki, ið snúði seg um hárviðgerð


Umframt at vera partur av skapandi deildini hjá TIGI er Nick Irwin eisini sera dugnaligur frisørur.

# KEKKAÐUR ÍBLÁSTUR TIL HÁRFRÍÐKAN

Planet.fo var við, tá TIGI á stórfingnari móttøku í Keypmannahavn sendi nýggja hárfríðkanar linjuna S-Factor á danska og harvið eisini føroyska marknaðin.

HÁRMÓTI

**Orð og myndir: Niels Uni Dam, nielsuni@sosialurin.fo**

Í innbjóðingini til móttøkuna hjá TIGI í sambandi við, at nýggja linjan av hárfríðkanar vørum S-Factor, kom á danska marknaðin, var lagt dent á, at talan var um eina stranga dress-code. Skuldi tú inn, skuldi tú vera ílatin hvít klæði, hetta var galdandi fyri frisørar og TIGI umboð, men eisini fyri tíðindafólkini..

**Sum ein trúðarbólkur**
Tá eg nærkaðist móttøkuni í Dansk Design Center mitt í Keypmannahavn, sá eg flokkar av fólki í hvítum klæðum, ið veruliga sóust aftur í gøtumyndini. Uttan fyri hurðina av Dansk Design Center steðgaði ein maður mær og spurdi um hetta var ein Scientology fundur, og ja tað tyktist næstan sum ein trúðarbólkur av onkrum slag, har vit stóðu fleiri hundrað fólk í hvítum.

**Hvítir føroyingar**
Alt var hvítt, sjálvt maturin jákupskeljar, mozzarella ostur og smákøkur alt hvítt, á hvítum borðiskum og við hvítum serviettum. Í millum øll hesi hvítkløddu hitti eg føroysku TIGI umboðini frá Kvilt hárfríðkan, saman við einum frisøri úr Salong Katrin á Toftum og einum úr Karinsa í Havn, báðar salongir nýta vørur frá TIGI. Tey vóru øll komin niður til móttøkuna, og gleddu seg øll til at sleppa at uppliva nýggju vørurnar, ið tey høvdu frætt so nógv um.

**Risa Show**
Sjálvt showið varð hildið á ovaru hæddini av Dansk Design Center í einum sali, ið var skrýddur til endamálið, og hevði bæði catwalk, nógva ljóð- og ljósútgerð umframt ein sjónvarpsvegg. Við hármótasýningum, live klipping, dansi showið og filmklippum á stórskíggjum, og tónleiki, ið allatíðina ferðaðist millum tað meditativa og tað diskotekskenda, stýrdi Nick Irwin frá skapandi deildini hjá TIGI showinum. Dansibólkurin Peter Friis Team framførdi dansistykki, ið snúði seg um hárviðgerð. Hetta var ein festlig og lívlig byrjan á kvøldið.

**Tað stutta verður inn**
Nick Irwin og ein annar úr skapandi deildini greiddu frá um hármótan, um hvussu hendan linjan passaði bæði til langa slættað hárið, ið hevur verið inn eina tíð og til stutta hárið, ið nú verður inn, umframt risastórt krúllutt hár. Teir kliptu modellum og vístu, hvussu hesar vørur kundu nýtast. Teir arbeiddu við modellum við longum og stuttum hár. Eingin ivi var um, at her var talan um show, ið skuldi virka sum íblástur fyri nógvu hárfríðkanar fólki, ið vóru til staðar.

**Høg góðska**
Alt var ómetaliga gjøgnumført, og luktaði av høgari góðsku og luksus. S-Factor er luksus og í einum hvítum rúmi á tremur við hvítklæddum fólki, var showið á catwalkinum í fullkomnum fokus.
Showið var flott lagt til rættis og riggaði hóast tað var langt. Hetta er eitt show, ið TIGI hevur ferðast kring heimin við seinasta árið, so alt tyktist kekka. Tó gjørdist endin eitt sindur ov nógv av tí góða, tá ein lokalur stylistur fekk teymarnar og skuldi vísa okkum boð uppá meira ekstremu partarnar av hármótanum, eitt nú hvat fór at verða at síggja á Catwalkum kring heimin. Hetta gjørdist sera langdrigið, og nógv fólk rýmdi.